


# Fullveldi við røttu ferðini

*Lesandi á Oyrasundskolleginum taka undir við fullveldistankanum, men nógv teirra meta skiftistíðina vera avgerandi fyri, um tað ber til at loysa frá Danmark. Tey halda, at ferðin á fullveldistokinum skal ikki vera so stór, at føroyska samfelagið fer at líða undir tí*

Grátt.

Kanska eitt sindur keðiligt, kanska eitt sindur oyði. Men bara uttan.

Inni í teimum stóru betongblokkunum á Oyrasundi andar av lívi. Fólk standa í gongini og práta, summi hava skund, fara inn í tær nakað slitnu lyftirnar, sum senda tey nakrar hæddir upp í loft, og uppaftur onnur eru á veg av húsum.

Oyrasundskollegiið kann neyvan ákærast fyri at vera sjarmerandi ella eksklusivt, men tað er heimstaðurin hjá nógvum lesandi føroyingum. Millum veggirnar inni í teimum stóru bygningunum hoyrir tú alla tíðina føroyska málið, og millum tey mongu andlitini eru altíð nøkur, sum tú kennir aftur.

Í forhøllini er ein listi yvir øll tey, sum búgva á næmingaheiminum, og har er lætt at fáa eygað á nøvn, sum ljóða føroysk. Tey eru at finna allastaðni. Undir D, undir K og undir S.

Og tey ikki bara ljóða føroysk, nøvnini eru eisini føroysk. Onkur nøvn kennir tú aftur, onkur klárar tú beinanvegin at plasera í onkrari bygd í Eysturoynni, onnur sleppa ikki undan sínum uppruna á sunnastu oynni í landinum.

### Tosa nógv um fullveldi

Tá tú ferðast av Christiansborg og til Oyrasundskollegiið, fert tú samstundis úr einum heimi, har politiska skipanin er neyvt fastløgd, har fundarskráir og yvirlit eru grundarlagið undir politiska arbeiðnum og kjakinum, og har tú møtir drivnum politikarum allastaðni.

Á Oyrasundskollegiunum eru fólkini eisini politisk tilvitað, men kjakið og prátið um fullveldið fer fram í veitslum, í lyftum og í teimum smáu íbúðunum, har føroyski blíðskapurin stórtrívist.

Tey føroysku lesandi hava øll eina meining um fullveldið og fullvseldisgongdina, og nógv teirra eru eitt sindur ivandi. Ikki serliga ivandi um, at í Føroyum skulu føroyingar ráða, men hvussu gongdin fram móti størri sjálvstýri skal vera.

Skiftistíðin - sum tað verður tosað so nógv um - er eisini avgerandi hjá nógvum av teimum føroysku lesandi.

- Eg dugi illa at ímynda mær, at tað ber til at taka fullveldi við eini skiftistíð upp á fýra ár, men er skiftistíðin eini 12-15 ár, so taki eg undir við fullveldinum, um avtalan annars hevði verið nøktandi fyri føroyska samfelagið, sigur Halla Nolsøe Poulsen, sum hevur lisið stjórnmálafrøði í tvey ár.

### Danir lítið upplýstir

Allir føroyingarnir, sum vit tosaðu við, tá vit vitjaðu á Oyrasundskolleginum mikukvøldið, vóru samdir um, at danir vita sera lítið um føroysk viðurskifti og um fullveldismálið.

-Teir danir, sum eg komi í samband við, hava allir ein niðursetandi hugburð mótvegis føroyingum. Sum oftast eru viðmerkingarnar tær, at tað er upp á tíðina, at føroyingar klára seg sjálvar uttan pengar frá øðrum, sigur Anna Borg Dahl, sum lesir løgfrøði á universitetinum í Keypmannahavn.

John Thomsen, sum arbeiðir sum handverkari, kennir støðuna aftur.

- Danir plaga at koma við viðmerkingum, sum tú kennir aftur frá lesarabrøvum í BT og Ekstrablaðnum. Tað ber ikki til at fáa eitt kjak í lag við teir, tí teir vita einki um føroysk viðurskifti, sigur hann.

Millum føroyingar er støðan eitt sindur øðrvísi, tí tey royna at fylgja við gongdini heima í Føroyum, og tá tey hittast í veitslum og øðrum samanhangi er prátið ofta um fullveldið. Serliga tá samráðingar eru.

Og tí er væntandi, at tá føroyingar hittast á Oyrasundskolleginum og aðrastaðni í Danmark um vikuskiftið, so fer nógv at verða tosað um samráðingarnar, sum vóru í gjárkvøldið.

Samráðingar, sum skulu gera av, um føroyingar skulu hava fult ræði í Føroyum, ella um ríkisfelagsskapurin við Danmark framhaldandi skal vera grundarlagið.

Um úrslitið verður ja ella nei á eini komandi fólkaatkvøðu fer tað neyvan at gera nakað við tann veruleika, at á Oyrasundskolleginum í danska høvuðsstaðnum eru føroyingar at síggja allastaðni.

Føroyingar sum gjarna kjakast um politisku støðuna har heima.



## Skiftistíðin avgerandi

*- Verður skiftistíðin eini 12-15 ár, so taki eg undir við fullveldinum, um avtalan annars hevði verið nøktandi fyri føroyska samfelagið, sigur Halla Nolsøe Poulsen*



Tað verður nógv tosað um skiftistíðina í sambandi við føroyska fullveldið, og hesin parturin av samráðingum er eisini avgerandi fyri, um Halla Nolsøe Poulsen kann taka undir við fullveldinum.

- Eg dugi illa at ímynda mær, at tað ber til at taka fullveldi við eini skiftistíð upp á fýra ár, sigur hon. Halla hevur lisið stjórnmálafrøði í tvey ár.

- Men er skiftistíðin eini 12-15 ár, so taki eg undir við fullveldinum, um avtalan annars hevði verið nøktandi fyri føroyska samfelagið.

Hon er samd við teimum sum siga, at um skiftistíðin verður fýra ár, so er ikki neyðugt við nakrari fólkaatkvøðu, tí føroyingar fara við vissu at atkvøða nei.

### Danir sakna sjónarmið

Halla Nolsøe Poulsen sigur, at danir, sum hon lesur saman við, sakna, at føroyingar gera meira vart við síni sjónarmið.

- Tað er so typiskt føroyskt, at vit helst tiga, men danir eftirlýsa, at vit koma meira fram við okkara sjónarmiðum, sigur hon.

Halla sigur, at tey fólkini, sum hon lesur saman við, ikki hava so negativan hugburð mótvegis føroyingum, sum so nógvir aðrir danir hava.

- Tey duga at síggja málið frá báðum síðum, og tey vita eisini, at tað ber illa til at taka eina avgjørda støðu, um tú ikki ert væl inni í málinum.

### Vita lítið

Men Halla sigur seg kenna væl til tann meira útbreidda hugburðin millum danir, sum eisini gevur seg til kennar í lesarabrøvum í donsku fyrrapartsbløðunum.

Hon leitar nøkur útklipp fram, sum hon hevur lagt til síðis, nevniliga sum dømi um niðursetandi hugburðin hjá dønum.

- Danir vita lítið um fullveldismálið, men tann vanliga hugsanin hjá teimum er, at danir skulu gjalda, og føroyingar skulu ráða.

Halla sigur, at umframt skiftistíðin, so metir hon eisini viðurskiftini hjá føroyskum lesandi í Danmark at hava stóran týdning í samráðingunum.

## Fullveldi er ov stórt stig

*Anna Dahl, sum lesir løgfrøði í Keypmannahavn, er sannførd um, at tað ikki verður eins liviligt í Føroyum, um vit fáa fullveldi*



–Eg ynski tað besta fyri føroyska samfelagið, og tí kann eg ikki ganga við til, at vit loysa frá Danmark, sigur ein avgørd Anna Borg Dahl úr Vági.

Anna heldur, at tað kemur at merkjast væl á livilíkindunum í Føroyum, um Føroyar fáa fullveldi. Hon er sannførd um, at føroyskt fullveldi merkir eitt fall í føroyska búskapinum – serliga um tað ikki eydnast at fáa í lag eina drúgva skiftistíð

### 15 ár ov lítið

Ein búskaparlig skiftistíð á 15 ár, sum landsstýrið hevur lagt upp til í sáttmálauppskotinum, er ikki nóg mikið til, at Anna tekur undir við fullveldisætlanini.

–Vit eiga at vera heilt vís í, at vit hava eina álítandi vinnu, ið kann halda samfelagnum uppi, áðrenn vit kvetta frá Danmark, sigur hon og vísir í hesum sambandi á, at føroyingar eiga at tryggja sær, at olja er í undirgrundini, soleiðis, at vit hava eitt alternativ til ótryggu fiskivinnuna.

Anna heldur ein stóra vanda við fullveldisætlanini, sum hon er nú, vera, at vit fáa stóran stættarmun í Føroyum.

### Fylgt ov lítið við málinum

Seinastu tíðina er lesnaðurin farin við allari tíðini hjá Annu Dahl. Tí hevur hon ikki havt eins góðar stundir, sum hon kundi hugsað sær, til at fylgt við gongdini í fullveldismálinum.

– Eg havi ikki lisið tað, ið hevur staðið í føroysku bløðunum um fullveldismálið seinastu tíðina. Tó havi eg roynt at fylgt við í donsku fjølmiðlunum, og harafturat tosa tey har heima í Føroyum altíð um fullveldismálið, tá eg ringi heim, sigur Anna Dahl. Men hon heldur kortini, at hetta ikki er nóg mikið til, at hon kann vera væl inni í málinum.

### Vilja sleppa av við Føroyar

Á Universitetinum tosa tey donsku lesandi ofta við Annu um fullveldismálið. Sum oftast fær Anna at vita, at tað er best, um Danmark sleppir sær av við Føroyar sum skjótast.

Slíkar viðmerkingar dámar ikki Annu at fáa. Men tá hon fær tær, roynir hon at greiða sum best frá føroysku viðurskiftunum.

Í lesibólkinum hjá Annu skilja tey tó betur støðuna. Tey skilja eisini, at Føroyar mugu fáa eina líkinda skiftistíð.

## Tað verður einki fullveldi

*- Eg trúgvi ikki, at hesar samráðingarnar fara at enda við fullveldi. Tá tað kemur til stykkis, fara føroyingar at atkvøða nei, heldur John Thomsen*



John Thomsen úr Havn arbeiðir sum handverkari í Keypmannahavn, og á hansara arbeiðsplássi verður ikki nógv tosað um fullveldi, hóast hann arbeiðir saman við føroyingum.

- Eg haldi, at vit eru ov samdir til at kjakast nakað serligt. Vit plaga at tosa eitt sindur um fullveldi, tá samráðingarnar eru og donsku fjølmiðlarnir gera eitt sindur burtur úr, sigur hann.

### Ber ikki til at kjakast

Hann sigur, at frá dønum hoyrist ein gjøgnumgangandi niðursetandi tóni, tá teir gera viðmerkingar til føroysk viðurskifti og fullveldissamráðingarnar.

- Tú kennir viðmerkingarnar aftur frá teimum smáu lesarabrøvunum í BT og Ekstrablaðnum, sigur hann.

- Tað ber ikki til at fáa eitt kjak í lag við teir, tí teir vita einki um føroysk viðurskifti, og tí spyrst tað ongantíð nakað skilagóð prát burturúr.

### Verður einki fullveldi

John Thomsen kennir seg sannførdan um, at tað verður einki fullveldi, hóast samráðingarnar millum stjórnina og landsstýrið.

- Tá tað kemur til stykkis, fara føroyingar at atkvøða nei á eini fólkaatkvøðu, sigur hann.

- Í løtuni sært tú nógv argument fyri fullveldinum, men eg rokni við, at tað verða argumentini hjá sambandsflokkunum sum fara at gera, at føroyingar ikki taka fullveldi, tá tað kemur til stykkis.

John Thomsen sigur, at tað ber illa til at taka støðu fyri ella ímóti fullveldinum, so leingi eingin ítøkilig avtala fyriliggur um, hvussu Føroyar skulu klára seg uttan ríkisfelagsskapin.

## Skulu vísa at tað ber til

*Súsanna Leo heldur, at tað er rætt at taka fullveldi, men fyrst skulu føroyingar vísa, at tað ber til*



- Eg havi ikki heilt álit á, at tað ber til at taka fullveldi, og tí skulu vit vera varðin, sigur Súsanna Leo úr Vági. Hon lesur løgfrøði á universitetinum í Keypmannahavn.

Hon sigur, at hon tekur undir við fullveldistankanum, men fyrst skulu føroyingar vísa, at tað ber til at taka fullveldi.

- Tað er neyðugt við nógvum íløgum í til dømis samferðsluna og heilsuverkið, og spurningurin er, um tað fer at lata seg gera, um vit taka fullveldi.

### Spyrja eitt sindur

Súsanna Leo sigur, at danir, sum hon lesur saman við, spyrja við hvørt eitt sindur um føroysku fullveldisæltanina.

- Men eg haldi, at teir eru rættiliga líkaglaðir. Summi halda, at føroyingar krevja ov nógv og ikki hava uppiborið so langa skiftistíð, sigur hon.

- Eg hoyri bara negativar viðmerkingar um føroyska fullveldið frá dønum. Men tað upplivi eg ikki sum nakran trupulleika.

### Tosa nógv

Føroysku útisetarnir tosa nógv um fullveldismálið, sigur Súsanna Leo.

- Tað kemur stundum fyri, at donsku sjónvarpsrásirnar vísa skeiva myndir, tá tær hava innsløg um Føroyar, og tað plaga vit millum annað at tosa um, sigur hon.

Súsanna lesur øll tey føroysku bløðini, men hon sigur seg ikki nærlesa alt. Og so fylgir hon eitt sindur við í donsku fjølmiðlunum.

- Eg avvísi ikki, at eg taki undir við fullveldinum, um skiftistíðin verður eini 15 ár, sigur hon.

**Orð og myndir: Eyðun Klakkstein og John Johannessen**